**LANDSROYND 4. FLOKKUR**
**MAI 2008**

Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

**45 minuttir**



*Mýrisólja. Heini Nygaard tók myndina*

| Navn: | Flokkur: |
|---|---|
| Skúli: | Lærari: |

**Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.**

# Set X við røttu myndina

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| appilsin |  ☐ |  ☐ |  ☐ |  ☐ |
| baðikar |  ☐ |  ☐ |  ☐ |  ☐ |
| dunnupar |  ☐ |  ☐ |  ☐ |  ☐ |
| eplavelta |  ☐ |  ☐ |  ☐ |  ☐ |
| fiskur |  ☐ |  ☐ |  ☐ |  ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **giraffur** |  |  |  |  |
| **hundahvølpur** |  |  |  |  |
| **indiáni** |  |  |  |  |
| **ísbjørn** |  |  |  |  |
| **jólatræ** |  |  |  |  |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **kaffikanna** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **lagkøka** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **málmaður** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **neyst** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **oljubilur** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **ólavsøka** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **pappageykur** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **roknimaskina** |  |  |  |   |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **sag** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| **telduskíggi** |  |  |  |  |
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **urtapottur** |  |  |  |  |
| **úthurð** |  |  |  |  |
| **vakstrarhús** |  |  |  |  |
| **yvirskegg** |  |  |  |  |
| **ýl** |  |  |  |  |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **eingil** |  |  |  |  |
| **eydnuhjól** |  |  |  |  |
| **oyggj** |  |  |  |  |

# Set kross við røttu myndina

## Gentan hevur fléttur



## Drongurin er í húgvu og hevur brillur



## Maðurin er í brillum og er skallutur



**Konan hevur stutt hár og ongar brillur**



**Gentan er í kjóla og er skóleys**



**Drongurin er í jakka og stivlum**



**Maðurin er í frakka, og hann hevur tasku í hondini**



**Konan hevur eitt kuffert í hondini, og hon er í húgvu og hevur turriklæði um hálsin**



**Gentan hevur ein bil í hvørjari hond**



**Drongurin hevur ein bil í aðrari hondini og eina fartelefon í hinari**



## Set ring um rætta svarið

Súsanna og Sámal eru úti og spæla. Tað er gott kavaveður, og tey eru farin at gera eina kavasmáttu. Tá ið smáttan er liðug, seta tey ljós inn í hana.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sámal og Súsanna | renna | | spæla | syngja |
| Veðrið er | gott | | ringt | ilsligt |
| Tey gera | kavamann | | kavasmáttu | kavahús |
| Hetta er um | várið | heystið | veturin | summarið |

ooo

Hvønn fríggjadag ganga Anna og Katrin til dans. Tær dansa hipp-hopp. Fleiri úr teirra flokki ganga eisini til dans, og viðhvørt dansa tey í fríkorterunum í skúlanum. Tað er stórasystir Onnu, sum lærir tey at dansa.

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Tey dansa* | line-dans | hipp-hopp | føroyskan dans |
| *Viðhvørt dansa tey í* | tímunum | fríkorterunum | skúlagarðinum |
| *Tey ganga til dans* | leygardag | mánadag | fríggjadag |
| *Tey ganga til dans* | 1 ferð um vikuna | 2 ferðir um vikuna | 3 ferðir um vikuna |

ooo

Á veg heim úr skúlanum møtir Hjalti Róa og Vár. Veðrið er so gott, sólin skínur bæði oman og niðan, og fuglarnir láta, so tey gera av at fara ein túr í hagan. Rói sendir sms til Randi og Lív og biður tær eisini koma við. Tey avtala at fara heim eftir matpakka og so møtast aftur klokkan tvey.

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Rói sendir sms til* | Hjalta og Vár | Vár og Lív | Randi og Lív |
| *Tey gera av at fara* | at svimja | at sparka | í hagan |
| *Tey skulu møtast aftur klokkan* | fimm | trý | tvey |
| *Hetta er um* | heystið | summarið | veturin |

ooo

Viðhvørt fara Tórður og Hanus í biograf. Tann seinasti filmurin, teir hava hugt eftir, eitur á enskum Over the Hedge.
Hesin filmurin er um tríggjar íkornar, sum fara at búgva hjá einum manni, sum eitur Dave.
Dave yrkir og skrivar løg til sangir, og íkornarnir, sum bæði duga at tosa og yrkja, gera av at hjálpa honum. Hetta eydnast sera væl, men best er kortini, at íkornarnir trívast so væl hjá Dave, at teir síggja hann sum nýggja pápa sín.
Tórður og Hanus hildu hendan filmin verða sera stuttligan.

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Tórður og Hanus* | hyggja í sjónvarp | fara í biograf | lesa eina bók |
| *Maðurin eitur* | David | Dave | Dávur |
| *Filmurin er um* | fimm íkornar | tríggjar íkornar | sjey íkornar |

o o o

Tað er fyrsti dagur aftan á summarfrítíðina. Lena, Annika, Rani og Birni eru glað at hittast aftur. Tey hava ikki sæst í summarfrítíðini. Lena hevur verið í Danmark og ferðast, og Annika hevur verið í Klaksvík hjá ommu síni. Rani hevur eisini verið og ferðast. Hann hevur verið í Italia, og tí er hann so sólbrendur, tí har var so heitt. Birni er eisini sólbrendur, hóast hann ikki hevur verið uttanlands. Hann hevur hjálpt pápabeiggja sínum at hoyggja. Pápabeiggi Birna  er bóndi, og Birni heldur tað vera stuttligt at hjálpa honum. Birni hevur eisini verið á fjalli, og hann hevur hjálpt til við at klippa seyðin hjá pápabeiggjanum. Børnini hava nógv at siga hvørjum øðrum, nú tey hittast aftur. Tey eru eisini glað um, at nú ganga tey í fjórða flokki, so tey kenna seg so vaksin. Tey eru eisini vaksin í summarfrítíðini. Tað sigur Hanus í øllum førum. Hanus er flokslærari hjá fjórða flokki. Hann hevur verið flokslærari hjá teimum, síðani tey gingu í fyrsta flokki, og tey hava hann í føroyskum og ítrótti. Børnini eru so spent til hetta skúlaárið, tí í ár skulu tey hava enskt fyri fyrstu ferð, og Hanus sigur, at hann skal eisini undirvísa teimum í enskum.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *Lena hevur verið og ferðast í* | Italia | India | Danmark | Klaksvík |
| *Omma Anniku býr í* | Kollafirði | Klaksvík | Danmark | Italia |
| *Pápabeiggi Birna hevur* | seyð | neyt | ross | høsn |
| *Nær er hetta?* | í desember | í august | í apríl | í juni |
| *Hanus undirvísir í* | føroyskum, enskum og ítrótti | | | |
| | føroyskum, donskum og enskum | | | |
| | enskum, ítrótti og rokning | | | |
| | føroyskum, rokning og enskum | | | |

**Hygg eftir klokkuni í royndarhølinum.**

**Hvussu nógv er klokkan nú?**

**Tekna pinnarnar á klokkuna.**



# Tekna eftir leiðbeiningini

1. Set ein kross í hvørt horn av fýrakantinum
2. Set ein kross mitt í fýrakantin
3. Tekna eina striku úr hvørjum horni inn til krossin í miðjuni
4. Set ein kross mitt í trýkantin høgrumegin
5. Tekna ein runding í ovasta trýkantin
6. Tekna ein fýrakant í trýkantin til vinstru
7. Skriva navn títt í niðasta trýkantin